


*– Javnaðarflokkurin eigur at kasta sín áhuga yvir almanna- og heilsuøkið fyri at reisa seg til næsta val, heldur Hjørdis Gaard, samfelagsfrøðingur. Hon vísir á, at tað arbeiða yvir 3.000 kvinnur í almanna- og heilsuøkinum, og at har tí eru nógvar atkvøður at heinta*

# Landsstýrisessirnir kosta

**ANALYSA** Javnaðarflokkurin er í svárum trupulleikum sambært seinastu veljarakanningunum. Flokkurin missir álitið millum veljararnar. Greiða niðurstøðan millum fólkini, sum Sosialurin hevur prátað við, er, at ábyrgdamenninir, formaðurin og landsstýrisfólkini, hava ikki røkt sína uppgávu nóg væl

Uni Holm Johannesen

Javnaðarflokkurin ekur á knøunum.

Sambært seinastu veljarakanningunum hava fleiri føroyingar mist álitið á flokkinum.

Feskasta veljarakanningin, sum varð kunngjørd fyri tveimum vikum síðan, gav Javnaðarflokkinum minstu undirtøkuna síðan 1932.

Eirikur Lindenskov er ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum. Hann heldur, at flokkurin er um at smella í svørðin.

– Fyri Javnaðarflokkin er katastrofan so stór, at um flokkurin ikki ger onkrar grundleggjandi broytingar her og nú, so kann hann tað sama pakka saman, skrivar hann í oddagrein.

Jóannes Eidesgaard tók fast um stýrisvølin á javnaðarskútuni í 1996. Avbjóðingin var møtumikil. Tað breyt í bæði borð hjá flokkinum, sum varð revsaður fyri búskaparkreppuna á valinum í 1994. Flokkurin misti tá nær um helvtina av sínum atkvøðum á valinum frá 1990.

Við Eidesgaard sum ábyrgdarmanni fann flokkurin fótafestið aftur í 1998. Orsøkin var serliga, at protestflokkurin, Verkamannafylkingin, varð syndraður, og fleiri veljarar snaraðu sær aftur til Javnaðarflokkin.

Men flokkurin hevur fingið fleiri so logandi á kjaftin síðan seinasta val, tá tingmannahópurin varð skerdur við einum limi – úr sjey og niður í seks tinglimir.

Samfelagsfrøðingar og politiskir viðmerkjarar draga somu línu. Javnaðarflokkurin hevur ein stóran trupulleika. Reyðu ávaringarlampurnar lýsa.

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at knútarnir verða loystir, um hann leggur frá sær sum formaður. Hann hevði ynskt, at hann var trupulleikin einsamallur, hóast hann ikki vísir aftur, at hann er ein lítil trupulleiki.

– Tað er ikki so einfalt, at allir trupulleikarnir í Javnaðarflokkinum verða loystir, um formaðurin leggur frá sær. Tilboðini og vælferðartænasturnar eru skerd, meðan Javnaðarflokkurin hevur sitið í samgongu, og tað vísir seg at fáa avleiðingar, sigur hann við Dagur og Viku.

## Landsstýrisessirnir kosta

Stóri trupulleikin hjá Javnaðarflokkinum hevur verið, sambært formanninum, at flokkurin dugir ikki serliga væl at selja sín boðskap. At flokkurin dugir ikki at varpa ljós á síni úrslit, so tey geva afturljóð í fjølmiðlunum og í fólkinum.

Endaliga niðurstøðan er, at Javnaðarflokkurin hevur sitið sum lús millum tvær negl í samgongu við tveimum borgarligum flokkum.

Tað er eisini sagt, at samtíðin er ikki til javnaðarflokkar, og at hinir flokkarnir endurita javnaðarhugsjónina. Niðurstøðan er, at stríðið fyri sjálvsøgdum rættindum er vunnið.

Sosialdemokratisku javnaðarflokkarnir í Norðurlondum dragast við somu trupulleikar. Gomlu siðbundnu javnaðarveljararnir eru minni sum samfelagsbólkur, og miðalklassin er størri. Bardagin hjá fakfeløgunum móti stættarsamfelagnum er ikki eins sjónligur. Tað hevur í flestu grannalondunum merkt, at sosialdemokratisku flokkarnir hava dagført sína stevnuskrá og lagt seg nærri miðini, tí samtíðin krevur modernisering, samanborið við gamla stríðið millum løntakaran og arbeiðsgevaran.

Hjørdis Gaard er samfelagsfrøðingur. Umframt vantandi hegni at umskipa seg, setur hon spurnartekin við avgerðina hjá Jóannesi Eidesgaard at taka við landsstýrisessinum í fíggjarmálum.

– Tað kostar at sita á pengakassanum, meðan tað er afturgongd í búskapinum. Tað er populerari at rinda út, enn at taka inn. Eidesgaard tók við uppgávuni, uttan at hava boð upp á loysnir, sum eru grundaðar á sjónarmiðini hjá flokkinum við samhaldsfasti og javna. Tú fært vald við at sita í samgongu, og tú skal royna at varðveita samgonguna, og samstundis hugsa um at verða afturvaldur. Tann javnvágin er miseydnað hjá teimum, sigur Hjørdis Gaard.

Hon heldur, at Javnaðarflokkurin stendur veikastur í landsstýrinum. Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, stendur í stað, og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, hevur greið boð upp á, hvussu skúlaverkið skal skipast rationelt, men tað er framvegis einki hent.

Jóannes Eidesgaard vísir ikki ákærunum aftur.

– Eg haldi, at Javnaðarflokkurin ger eitt gott arbeiði, men vit føra kanska ikki nóg sterkan sosialpolitikk við tveimum borgarligum flokkum í samgonguni, sigur hann.

Øssur Winthereig, journalistur, hevur verið tíðindaleiðari í Kringvarpinum, umframt at hann var virkin politikari í Verkamannafylkingini fyrst í nítiárunum. Hann heldur, at føroyski Javnaðarflokkurin hevur ongan greiðan politikk, sum sigur føroyingum, hvat tað er at vera sosialdemokratur í 2011.

– Í somu løtu flokkurin veit, hvat hann vil og meinar, og torir at standa við tað, so verður betri hjá Javnaðarflokkinum, sigur hann.

### Kann reisa seg

Tað krevur nøkur ódnartøk, um Javnaðarflokkurin skal standa seg væl til næsta løgtingsval.

Fleiri hava sett spurnartekin við Jóannes Eidesgaard sum formann, tí hann kann ikki erpa sær av sínum úrslitum sum javnaðarovasti.

Tað er hinvegin eisini greitt, at eingin upplagdur avloysari er til formansessin. Aksel V. Johannesen er ikki fólkavaldur, John Johannesen, sum er formaður í tingbólkinum, situr ikki í landsstýrinum, og Helena Dam á Neystabø hevur fortíð í øðrum flokkum, og tað er ikki ein fyrimunur hjá henni.

Líkindini eru stór fyri, at Jóannes Eidesgaard stendur eisini á odda fyri flokkinum næsta valstríð.

Hjørdis Gaard heldur, at Javnaðarflokkurin skal millum annað kasta sín áhuga yvir almanna- og heilsuøkið fyri at reisa seg til næsta val. Tað fer hinvegin at krevja nøkur ódnartøk av flokkinum.

– Tað kundi verið ein loysn. Tað arbeiða gott og væl 3000 kvinnur í almanna og heilsuøkinum, og tað eru nógvar atkvøður. Kjarnuveljarin hjá Javnaðarflokkinum er í almennu arbeiðsplássunum, og við at fáa fatur aftur í kjarnuvirðunum, kann flokkurin fáa fleiri atkvøður, sigur Hjørdis Gaard.